**Kvæðatilfar - Nr: 10**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. – 9. flokkur
1. - 3. flokkur (sí undir onnur hugskot)

**Uppgávuslag / heiti:** Vit stilla okkum í rað

**Vegleiðing:**

Uppgávan hóskar seg til endurtøku av søgugongdini og ørindunum.

Viðfest eru ørindini úr Brestis kvæðnum sum dømi.

Lærarin skal brúka eins nógv ørindi, sum tað eru næmingar í flokkinum.
Í einum flokki við sekstan næmingum, leggur lærarin ørindini eitt til sekstan á borðið.

Ørindini skulu vera atskild eitt og eitt og mugu ikki hava nummar. Nú taka næmingarnir eitt ørindi í part.

Uppgávan hjá næmingunum er at stilla seg soleiðis, at næmingurin við ørindi eitt stendur fremstur, næmingurin við ørindi tvey næstur o.s.fr.

Næmingarnir hava ikki loyvi at tosa saman, meðan teir stilla upp. Teir hava tó loyvi at hjálpa hvør øðrum á annan hátt.

Tá allir næmingarnir eru komnir í raðið, taka teir hendurnar saman og kvøða ørindini. Ein møguleiki er, at lata hvønn næming skipa sítt ørindi.

**Onnur hugskot:**

Ístaðin fyri at nýta tekstin til hvørt ørindi, ber eisini til at nýta tekningar (sí uppgávuna Teknirøð). Hetta ger tað eisini møguligt hjá smærri flokkunum at nýta uppgávuna.

**Kvæðatilfar - Nr: 10**

Árla var um morgunin,
sólin roðar í hav,
Beinir gekk í skálan inn,
sum Brestir sterki svav.

"Statt upp Brestir, bróðir mín!
sól í skorar gyllir,
eingin blæsur vindur á vág,
og sjógvurin er stillur.

Lít tær út á Lítlu Dímun,
har hvítir ei við tanga,
aldri fæst ein betri dagur
bjargaseyð at fanga."

Tóku bond og bjargalínur,
gyrdu svørð við belti,
gingu so til strandar oman,
dreingir tveir teir eltu.

Mælti tað Sigmundur Brestisson,
vetrar var hann níggju:
"Eg skal út á Lítlu Dímun
hin villa veðr at síggja."

Svaraði Tórir Beinisson,
á tólvta ári var:
"Faðir, fert tú á Dímun út,
lat meg fylgja tær!"

"Hvat skulu tit á Dímun gera,
har eru stíggir trongir,
langir eru teir loftskútar,
og lágir eru tit dreingir."

Svaraði Sigmundur Brestisson,
snimma vaks hans hugur:
"Hann, ið alist við øsku inni,
lítið í leikum dugir!"

"Satt hann sigur, sonur mín,"
Brestir tók til orða,

**Kvæðatilfar - Nr: 10**

"eingin skal hjá ungum alva
bragdarhugin forða."

Tóku bát úr tøttum neysti,
rangt var teimum sjógvað,
dreingir settust á rengur niður
og høvdingar at rógva.

Løgdu teir at oynni inn,
bátin upp teir drógu,
gingu so í bergið fram,
sum brattar rásir lógu.

Fótafimir og klófastir,
óttaðust ei nakað,
lupu lætt um leysar upsir
styggan seyð at taka.

Fimm hundrað av áseyði
Lítla Dímun bar,
svart var alt sum kolamógvur,
eyðkent slag tað var.

ygt og kvikt sum villur fuglur,
vártreyst út av lagi.
So er sagt, at Hvalbingar,
teir tóku av alt slagið.

Tykir mær tað harmiligt
at fara so um fæ;
fyrnsta seyð, í Føroyum var,
meg lysti enn at sæð

Fullvæl dugdu høvdingarnir
vargaseyð at veiða,
gingu so at báti oman,
fongin við sær leiða